


*Nr. 7* **5. apríl 2015** *75. árg.*

# Sóu og trúðu

> *Tá fór eisini hin lærusveinurin inn, sum fyrr var komin til grøvina, og hann sá og trúði. Tí at enn høvdu teir ikki skilt skriftina, at hann átti at rísa upp frá deyðum.*
>
> *Jóh. 20,8-9.*

Lærusveinarnir sótu aftan læstar dyr í Jerúsalem. Teir vóru deyðaræddir. Tað, teir høvdu upplivað seinastu dagarnar, hevði skelkað teir. Teir høvdu upplivað, at tað besta og fínasta menniskjað, teir høvdu kent, harðliga varð handtikin. Uttan eina rættvísa rættargongd var hann dømdur til deyða og tikin av døgum á ræðuligasta hátt, ið hugsast kann. Hvør kundi kenna seg tryggan eftir hetta?

Meðan teir soleiðis sita har, verður bankað harðliga á dyrnar, og teir hoyra kvinnurnar siga frá, at tær hava verið úti við grøvina og sæð, at hon var tóm. Pætur og Jóhannes lupu avstað. Jóhannes rann skjótari og kom fyrr til grøvina. Hann hyggur inn í grøvina og sær, at hon veruliga er tóm. Síðani kemur Pætur rennandi og fer beina leið inn í grøvina og sær tað sama. Hvat merkir alt hetta?

Jóhannes sigur í evangelii sínum frá tí, sum hendi. Tá ið hann steig inn í grøvina, sá hann og trúði. Hvat, hann trúði, stendur í næsta setninginum. Hann trúði tí, sum skrivað var í Heilagu Skriftunum um, at Messias átti at rísa upp frá deyðum.

Men ikki var tað, fyrr enn teir næstan høvdu runnið lívið úr sær út til Jesu grøv og við egnum eygum sóu, at grøvin var tóm, at teir skiltu, hvat Skriftin talaði um, og hvat Jesus hevði roynt at fyrireika teir til. Teir høvdu ikki trúð, fyrr enn teir sóu tað. Júst tað var við til at gera vitnisburð teirra trúligan. Tað er grundað

á frásøgn teirra, at vit trúgva á Jesu uppreisn. Teirra frásøgn er eftirfarandi. Vit takka fyri tað, teir sóu, og vit trúgva sjálvi eins og eygnavitnini.

*Songur tí berst um lond og høv*
*um páskaboðskapin bjarta,*
*fagurt hann ljóðar við opna grøv*
*inn í tað trúgvandi hjartað:*
*"Risin av grøv er frelsari mín,*
*deyði, hvar er nú broddur tín?*
*Tøkk havi Gud fyri lívið!"*

# Gudloysi

*Hin gudleysi vendi um frá vegi sínum. Jes. 55,7.*

Sum frá er liðið, er tað vorðið soleiðis, at vit kanska siga, at eitt gudleyst menniskja er eitt menniskja, sum livir í øllum møguligum, ræðuligum syndum – kanska alment, so ein og hvør sær tað.

Men orðið gudloysi merkir jú í sjálvum sær als ikki tað, hvussu vit nú á døgum skilja orðið. Tað merkir rætt og slætt eitt menniskja, sum ongan Gud hevur. Eitt kærleikaleyst menniskja er eitt menniskja, sum ongan kærleika hevur. Eitt áhugaleyst menniskja er eitt menniskja, sum ongan áhuga hevur, og eitt gudleyst menniskja hevur ongan Gud.

At liva í gudloysi er at liva lívið við ongum Gudi, og hin gudleysi hevur ongan ráðgeva, tá ið lívsins hørðu trupulleikar herja á – hann hevur ongan Gud hjá sær í arbeiðinum og í frítíðini – hann livir bara í sjálvum sær. Hetta er gudloysi. Og nú á døgum trívist gudloysi væl í heiminum, ja, gudloysisfeløg eru enntá stovnað.

Latum okkum øll tí ikki liva hesar stuttu dagar í gudloysi. *Tak Jesus við tær, hvar tú fert!*

*t.* týddi.

---

Ein vinnur túsund, og tveir vinna ..., nei, ikki 2.000, men 10.000! sigur Bíblian (5. Mós. 32,30). Finn tær onkran at biðja saman við, so tú kanst gera ein mun í hesum landi. Hugsa tær at vinna so mangar sálir fyri Harran!

*e.c.* ums.

# Evangeliið um grøðing

Jesus tosaði arameiskt. Bíblian endurgevur fleiri arameisk orð, sum Jesus brúkti í støðum, har hann grøddi sjúk menniskju. Eitt dømi er orðið Effata, sum merkir: Lat teg upp! Jesus brúkti hetta orðið, tá ið hann grøddi hin deyvstumma mannin. Henda frásøgnin er umrødd í Markus 7,32-34. Jesus talaði beinleiðis til oyruni á dronginum, sum lótu seg upp.

Tað er so framúrskarandi við Jesusi. Bíblian greiðir frá, at hann gekk um og gjørdi væl og grøddi tey sjúku. Sálmur 33,9 sigur: “Tí hann talaði, og so varð tað; hann beyð, og so stóð tað.”

Eitt ótrúligt dømi úr Bíbliuni er Jósva. Hann hevði eina bjóðandi, djarva trúgv, sum gjørdi, at hann enntá gav sólini og mánanum boð um at standa still. Og soleiðis bleiv tað, heilt til fólkið hevði fingið hevnd yvir fíggindar sínar. Jós. 10,12-13.

Í Markus 5,41 stendur søgan um smágentuna, sum varð vakt aftur til lívs. Jesus tók í hondina á henni og segði: “Talita kumi!" Umsett merkir tað: "Lítla genta, eg sigi tær, reis teg!” Bíblian sigur, at gentan reistist í stundini og gekk um.

Henda dimensiónin hoyrir trúnni til. Gud hevur kallað okkum til at hava hesa dimensiónina við í trúgv okkara. Besti mátin at gera Jesu gerningar, er at gera gerningarnar á sama hátt, sum Jesus gjørdi teir. Minst til, Jesus hevur givið okkum myndugleika at brúka navn hansara.

Tað vóru ikki bara tey fyrstu kristnu, sum skuldu gera Jesu gerningar, eisini tey seinastu skulu gera tað sama. Viðhvørt ber tað við sær, at vit mugu geva eini boð. Minst til, vit hava okkurt, sum læknarnir ikki hava, nevniliga møguleikan at biðja í Jesu navni.

Åge Åleskjær.
*Effie Campbell* umsetti.

---

Harrin er hin sami í Føroyum sum í Afrika. Feilurin er tann, at vit hoyra ov lítið til, hvat ið Harrin ger í dag. Tey trúgvandi tosa um, hvussu tað var fyrr, og hvat ið kemur; men greið fólki frá, hvat ið Harrin ger í dag. Vænta frá Gudi. Hvat sigur Guds orð? Tak hann upp á orðið. Harrin svarar, og hann er trúfastur.

*e.c.* ums.

# Lat Gud ráða

Hevur tú nakrantíð upplivað, at eitt gott orð líkasum sakk niður í sálardýpið og gav lívsmót, og tankarnir fóru at sveima? Eg minnist eitt ørindi úr kenda sálminum hjá Paul Gerhardt "Lít allar tínar leiðir", sum einaferð gav mær ein undurfullan frið og tryggleika og lyfti tonkunum upp móti tí høga.

*Gev Harra tínum gætur,*
*tá væl tað gongst tær við,*
*ert tú í honum mætur,*
*tá fært tú fragd og frið;*
*tann sorg, tú sjálvur aldi,*
*man eina níva á,*
*tú onki eigur valdið,*
*men Gud man vita ráð.*

Slík góð sálmaorð byggja á mong lyftir í Bíbliuni. Einaferð segði Jesus við vinir sínar, sum vóru fjálturstungnir og stúrdu fyri morgindegnum "Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum; eg gevi tykkum ikki eins og heimurin gevur. Hjarta tykkara óttist ikki og ræðist ikki! (Jóh. 14,27)

---



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum einar gleðiligar páskir!***

**_Heilsan Blaðstjórin._**



---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 5. apríl. | Tekstur: Luk. 24,13-35; | bíbliuorð: Luk.24,34b |
| 12. apríl. | Tekstur: Dóm.6,1-3+11-16+25-31; | bíbliuorð: Dóm.6,16b |
| 19. apríl. | Tekstur: Dóm. 7,1-4 +9-21; | bíbliuorð: Jes.41,10 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




**Nr. 8** **19. apríl 2015** **75. árg.**

# Veikleikin hjá Gudi sterkari enn menniskjan

*Og veikleikin hjá Gudi er sterkari enn menniskjan.*
*1. Kor. 1,25.*

Týðiligast sæst hetta við Jesu kross. Ongin rættir hond frá síðu at forða fyri, at skarnsgerðin verður fullførd. Teir hava sligið hann og spýtt á hann; teir hava háðað og spottað hann, og nú er hann negldur á krossin. Eitt av teim sjey krossarorðunum er: "Faðir, fyrigev teimum, tí teir vita ikki, hvat teir gera."

Vilt tú síggja veikleika Guds, skalt tú stilla teg undir Jesu kross. Men tú mást vænta, at ljósið sker í eyguni. Við krossin møta vit nøkrum, sum ikki er av hesum heimi, og tí mugu vit endurmeta hugsanir okkara. Hvat er styrki? Hoyra harðskapur og styrki saman? Er makt tað sama sum eitt roysnisbragd? Um so er, er tað ikki hjá tí krossfesta, vit skulu leita. Ein og hvør sær, at krossurin er veikleikans tekin.

Hví leita menniskju so enn til krossin? Har má vera onkur orsøk. Er ein fjald styrki at finna har? Ja, tað er tað. Styrkin í hesum heimi ber ótta og ræðslu við sær. Tað ónda í heiminum og í okkara egnu hjørtum er ræðandi. Vit sleppa ikki frá spurninginum: Er ikki ein onnur styrki til? Jú, og bara við Jesu kross fáa vit spurningin svaraðan.

Veikleikin hjá Gudi er sterkari enn menniskjan. Mundi Pilatus ikki hava eina hóming av hesum, tá ið hann sló nevan í borðið og segði: "Tað, sum eg havi skrivað, havi eg skrivað?" – Kærleikin er sterkasta megin, men hann er ikki førur fyri at skjalprógva styrki sína: hann kann bara elska, tola, líða, doyggja. Og hvat hevur tað við styrki at gera?

Bara trúgvin sær, at Guds veikleiki er sterkari enn menniskjan. Tá ið trúgvin sær tað, umskapast hon til tøkk og tænastu og trúskap - líka til deyða. Trúskap móti honum, sum prógvaði, at kærleikin sigrar, hóast styrkin í hesum heimi tykist at vera tann sterkara.

*Tú veitst tað væl, mítt hjarta,*
*at megi Guds er sterk,*
*men fíggindi Guds mangan*
*tær gjørdi skaðaverk.*

*Tú stríð tó í tí treysti*
*- um fall tær fell í lut –*
*at fíggindin er sterkur,*
*men sterkari er Gud.*

# *Tveir spurningar*

Ein blaðstjóri setti norðmanninum Helge Flatøy, sum fer út í missión, tveir spurningar:

Hvat argar teg?

Tað, sum kanska argar meg meir enn nakað annað, er, tá ið vit sum kristin ikki síggja hvørjar møguleikar og tilfeingi, vit eru. Tað stendur jú í Ef. 2,10: "Tí at vit eru verk hansara, skapaðir í Kristi Jesusi til góðar gerningar, sum Gud frammanundan hevur skipað fyri, at vit skulu leggja okkum eina við teimum." Og kortini velja vit at halda, at vit eru ov lítil, vit kunnu ikki, vit duga ikki, øll onnur duga so nógv betur, og hetta er ikki mín ábyrgd, og so víðari. Um ikki vit í heimsins besta landi, við størsta tilfeinginum, og við bestu útbúgving í verðini ikki skuldi gjørt tað, hvør skuldi so!!

Hvat gleðir teg?

Einki gleðir meg meir enn tann ótrúliga náðin, sum okkum er givin. Tann sannroyndin, at Gud sjálvur elskar okkum so høgt og vil, at tað vit gera, skal eydnast hjá okkum. Hugsa tær, at hann hevur givið okkum missiónsboðini! Tað er jú heilt ótrúliga gott, at Gud, skapari himmals og jarðar, hevur so stórt álit á júst tær og mær, at hann hevur givið okkum boð um at siga øllum menniskjum, at Jesus elskar tey so høgt, at hann ofraði egna lív sítt fyri tey. Tað er ein loysn, og tað fer at koma ein Himmal, ein ævinleiki uttan sjúku og plágur. Kann nakað verða betri enn hetta? Harrin sjálvur hevur so stórt álit á okkum, at vit hava fingið heimsins týdningarmesta arbeiði!

*Effie Campbell* umsetti.

# Náða meg, Gud

*Náða meg, Gud, fyri miskunn tína, fyri tína stóru várkunn strika út misgerðir mínar.*

*Sálmur 51,3.*

Henda sálmin hava stórir mannaskarar gjørt til bøn sína. Hann er sum ein tempultrappa, sum óteljandi føtur hava stigið á. Tað hevur bara verið eitt menniskja, sum ikki kundi nýta hana, hann, sum ikki gjørdi synd, og svik vórðu ikki funnin í munni hansara.

Hin heilagi Augustin hevði skrivað hesi orðini úr sálminum á veggin, har hann andaðist, so hann altíð kundi síggja tey og ogna sær tey djúpari. Kanska verður sálmurin okkum kærari, eldri vit gerast.

Synd er ein blettur, eitt klór, í lívsins bók, sum sálmaskaldið biður um at fáa burtur: strika út misgerðir mínar. Sum gomul handrit mangan eru útklórað, fyri at onnur skrift kundu verða sett afturat á bløðini, soleiðis er okkara ungdóms sakloysi vorðið dálkað av syndum, sum vit seinni gera. Náða meg, Gud, strika út misgerðir mínar!

Synd er óreinska á hinum hvíta klædninginum. Tí biður sálmaskaldið: “Tváa meg væl, so eg sleppi frá misgerðunum.” Bara ein vegur gongur inn í hitt nýggja Jerúsalem: at tváa kyrtil sín reinan í lambsins blóði og gera hann hvítan.

Synd er spitalska sjúka. Tí biður sálmaskaldið: “Reinsa meg frá míni synd, reinsa meg við ísoppi.” Tá ið hin spitalski rópaði á Jesus: “Um tú vilt, so kanst tú reinsa meg,” nam hann við hann, og hann gjørdist reinur.

Tað er hitt dagliga sambandið við Jesus, sum reinsar okkum. Latum okkum ærliga játta syndir okkara fyri Harranum og lata hann nema við tær, tá reinsar hann okkum: “Men um vit ganga í ljósinum, eins og hann er sjálvur í ljósinum, tá hava vit samfelag hvør við annan, og blóð Jesu reinsar okkum frá allari synd.” (1.Jóh. 1,7)

*t.* týddi.

---

Tá ið Jesus kom í heimin í kjøti og blóði, var hann hin mest ektaði jødin, sum nakrantíð hevur livað, og tá ið hann kemur aftur, kemur hann ikki til USA, Kina ella Evropa, men til Jerúsalem.

*e.c.* ums.

# Tað, onki eyga hevur sæð

Kendi uppfinnarin, Thomas Edison lá fyri deyðanum. Hann var veikur og segði ikki nógv. Læknin, sum eisini var vinur við familjuna, varnaðist, at Edison royndi at siga okkurt, so hann boygdi seg niður yvir tann sjúka og hoyrdi gamla uppfinnaran teska: "Tað er ógvuliga vakurt hinumegin." Hetta gjørdust hansara seinastu orð.

Bíblian avmyndar nýggja lívið, sum Gud hevur lagt til rættis, so einskila vakurt. Vit skilja ikki nógv av tí, men kunnu líta á, at tann kærleikin, sum var so sterkur, at hann sendi Jesus sum Frelsara, tann kærleikin kann ikki annað enn geva okkum alt. Soleiðis stendur skrivað í Bíbliuni:

"Tað, sum eyga ikki sá, og oyra ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, tað sum Gud hevur tilbúgvið teimum, sum elska hann." (1.Kor.2,9)

*Hvørt kvøld, tá sólin fer í kav,*
*og roðar himmal, roðar hav,*
*mítt eyga sær eitt bílæt av*
*tí landi, Harrin okkum gav*

---

"Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur, tú, og tú einsamallur ..." (Áps. 16,31) Er tað soleiðis, at tað stendur? Nei!! " ... og tú skalt verða frelstur og hús títt." Tín frelsa er knýtt til frelsuna hjá allari tínari familju. Herja tí á í bønini fyri øllum tínum, og ger tað í treysti. Gud elskar familjuna.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 19. apríl. | Tekstur: | Dóm. 7, 1-4 +9-21; | bíbliuorð: | Jes.41,10 |
| 26. apríl. | Tekstur: | Rut.1,1-5+16; +2,11-12;4,9; | bíbliuorð: | Jes.49,15d-16a |
| 3. mai. | Tekstur: | 1.Sám.1,9-20; +2,1-2; | bíbliuorð: | 1.Sám.2,3c |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74